# Vegleiðing til nýtslu av Whereby

Samtalur við viðgerða á Blákrossheiminum fara fram umvegis forritið Whereby.

Í teldupostinum, tú hevur fingið frá tínum viðgerða er ein leinkja til rúmið á Whereby har, samtalan fer fram.

Samtalan kann gerast yvir teldu ella telefon.

**Um tú brúkar teldu:**

1. Tá ið avtalaði tíðin er komin, opna leinkjuna við tínum kaga við at trýsta á leinkjuna, sum tú hevur fingið í teldupostinum (Whereby tykist tó ikki at rigga við Firefox).




2. Skriva títt navn.




3. Gev kaganum loyvi at brúka myndatól og mikrofon.




Tað er ymiskt frá kaga til kaga, men tá eini boð, sum líkjast hesum koma fram, trýst á "Allow" (ella "Tillad" á donskum).




4. Banka uppá hjá tínum viðgerða við at trýsta á "Knock".

5. Bíða inntil tín viðgerði letur upp.

**Um tú brúkar telefon:**

1. Tá ið avtalaði tíðin er komin, opna leinkjuna við tínum kaga við at trýsta á leinkjuna, sum tú hevur fingið í teldupostinum.

Tú mást hava Whereby-appið á telefonini fyri fáa best burturúr tænastuni.

Um appið ikki er á telefonini, so kanst tú, tá ið tú hevur opnað leinkjuna, velja ímillum at 1, opna Whereby-appið ella 2, brúka tænastuna í tínum kaga. Velur tú 1, opnar tú App ella Play Store, har tú kanst leggja Whereby-appið inn á tína telefon. Tá ið tú hevur gjørt tað, fylg so hesi vegleiðing. Velur tú 2, fylg so vegleiðingini omanfyri.




2. Gev appinum loyvi at brúka myndatól og mikrofon.







Trýst á OK í báðum førum.




3. Fyri at byrja samtaluna, trýst á Join.




4. Vel um tú vilt bara hava ljóð ella eisini mynd.




5. Banka síðani uppá og bíða inntil viðgerðin letur upp.